Fyrrverandi stovnsleiðari í Danmark:

# Hon eltir slóðir Wil

Seinastu fimm árini hevur Chirstin Plate í frítíðini hildið fyrilestrar um verkini hjá Williami Heinesen, og hevur á arbeiðsferð í Føroyum funnið nýtt forvitnisligt tilfar um kenda rithøvundan, at arbeiða víðari við. Hon er eisini forkvinna í Føroyska Kvinnufelagnum í Keypmannahavn, og fer í næstum undir at skriva minnisrit um søguliga felagið



*– Eg havi altíð hildið skrivingina hjá Williami Heinesen vera sera spennandi og eri hugtikin av tekningum og klipmyndum hansara av trøllunum og øðrum verum. Tað er eisini áhugavert at kanna hansara hátt at fata kvinnuna og tann góða og ónda í hansara bókmentum, sigur Chirstin Plate*

SAMRØÐA
*Dagny Joensen*

62 ára gamla Chirstin Plate er virkin kvinna, sum setir út í kortið, hvørji áhugamál og tiltøk hon vil fremja, nú hon er farin frá sum stovnsleiðari á deildini fyri víðari útbúgvingar á Dansk Sygeplejerskehøjskole í Danmark.

Áhugamálini eru m.a. at halda fyrilestrar um bókmentirnar hjá William Heinesen, rithøvunda sála, og at virka sum forkvinna í Føroyska Kvinnufelagnum í Keypmannahavn.

Chirstin Plate er dóttur Ásu og Helge Michelsen í Havn. Hon eigur trý tilkomin børn, sum búgva í hvør sínum heraðshorni uttanlands og ein ommuson.

- Tá børnini fóru heimanífrá var tað ein stór broyting í lívinum, og tá eg gavst sum stovnsleiðari fyri stuttum, havi eg nú stundir at gera nakað við míni áhugamál, sigur Chirstin Plate.

Fyrilestrar um William Heinesen hevur hon hildið seinastu fimm árini, men vil fegin víðka um innihaldið, við at samantvinna skriving og myndlist hansara til ymisk tema. Hon hevur á arbeiðsferðini í Føroyum fingið nýtt forvitnisligt tilfar, sum hon ikki visti var til, at arbeiða víðari við.

Føroyska Kvinnufelagnum í Keypmammahavn fylti 60 ár í fjør. Tá var samtykt at skriva minnisrit um hetta felagið, sum Chirstin Plate og Elsa Zachariasen, fyrrverandi forkvinna í felagnum, hava fingið til uppgávu at skriva.

- Tá tú býrt í Danmark og fæst við føroysk viðurskifti, er tað nógv lættari at fáa tilfar til vega í Føroyum, sigur Chirstin Plate, sum seinasta mánaðin hevur búð í Heinesens Húsi.

Kanna frá føroyskum sjónarhorni

- Hóast nógvar bøkur eru skrivaðar um skaldskapin hjá Williami Heinesen, so haldi eg, at tað er áhugavert frá einum føroyskum sjónarhorni at kanna, hvussu hann sær tað yvirnáttúrliga og hvussu hann brúkar skemt í síni skriving, eins og hvat hann sigur um tað átrúnarliga, um ellisárini og deyðan, sigur Chirstin Plate.

- Bert tað, at eg hava búð í Heinesens húsi hevur verið hugvekjandi. Eg eri komin nærri Williami við at ganga í Viðarlundini og í gøtunum, har hann hevur gingið. Tað vísti seg eisini, at tað vóru so nógvir lutir og viðurskifti, sum eg ikki visti um rithøvundan, hóast eg havi arbeitt nógv við hansara tekstum, sigur Chirstin Plate.

- Tað hevur eisini gjørt arbeiðið lættari, at eg kundi fara á Býar- og Landsbókasavnið at leita eftir tilfari. Starvsfólkið har



*Chirstin Plate: - Bert tað, at eg hava búð í Heinesens Húsi hevur verið hugvekjandi. Eg eri komin nærri Williami við at ganga í Viðarlundini og í gøtunum, har hann hevur gingið. Tað vísti seg eisini, at tað vóru so nógvir lutir og viðurskifti, sum eg ikki visti um rithøvundan, hóast eg havi arbeitt nógv við hansara tekstum*